GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Sunny**
4 hurðar
10.000

**Nissan Sunny 1,6 SGX Aut.**
ljósabláur, 4 hurðar,
árg. 1988.
12.000

**Nissan Almera 2,0D GX**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 118.000 km.
100.000

**Nissan Primera 2,0 SLX**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1997, 45.000 km.
105.000

**Nissan Primera 1,6 LX**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1995, 126.000 km.
69.000

**Nissan King Cab 4x4 Diesel**
gráur, 2 hurðar,
árg. 1996.
78.000

**Peugeot 106 Diesel**
gráur, 3 hurðar,
árg. 1996, 110.000 km.
72.000

**Peugeot 206 XRD 1,9**
bláur, 3 hurðar,
árg. 1999, 60.000 km.
112.000

**Peugeot 206 XR 1,4**
svartur, 3 hurðar,
árg. 1999, 88.000 km.
100.000

**Peugeot 306 DT 1,9**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1997, 150.000 km.
90.000

**Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1994, 230.000 km.
120.000

**Opel Combo 1,4 Van**
hvítur, 3 hurðar,
árg. 1997, 52.000 km.
59.000

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
67.000

**Opel Astra 1,7Dtl**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 108.000 km.
99.000

**Opel Astra 1,6 Club**
grønur, 4 hurðar,
árg. 2000.
119.000

**Opel Astra 1,6**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1999, 52.000 km.
119.000

**Opel Astra 1,6**
svartur, 5 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
105.000

**Opel Astra 1,7 Wagon**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 142.000 km.
55.000

**Opel Vectra 1,4**
hvítur, 4 hurðar,
26.000

**Opel Vectra 1,8**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1998, 29.000 km.
129.000

Gevi gætur: Bilarnir á listanum kunnu ver a seldir
Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61


## VIÐMERKINGAR

# Hvør sigur (ó)satt


**Hendrik Old**
*løgtingsmaður*




Løgmaður boðar Javnaðarflokkinum frá at har var einki at gera við samstarvi við Javnaðarflokkin, hansara boð til Javnaðarflokkin vóru púra greið: Tjóðveldisflokkurin vil ikki hoyra talan um at Javnaðarflokkurin skal við í eina komandi samgongu. Hetta hoyrdi eisini alt Føroya Fólk í útvarpinum sunnudagin tá løgmaður sigur at tað nyttar lítið at bara Fólkaflokkurin vil hava eina breiða samgongu. Fýra tímar seinni boðar Høgni Hoydal frá í útvarpinum at hann hevur einki í móti at samstarva við Javnaðarflokkin. Spennandi verður at síggja um løgmaður góðtekur at standa eftir sum tann sum sigur ósatt.

Hevur alt tosið hjá løgmanni um breiða samgongu einans verið sjónleikur fyri at tann hóvligi parturin í hansara egna flokki kundi haldast henn nakrar dagar. Tað kundi sæð soleiðis út tí so skjótt sum boðini koma úr London (í Dimmu tórsdagin) um at nú skal ein samgonga síggja dagsins ljós, helst við bara 16 tinglimum tagnar alt tos um breiðar samgongur, og løgmaður sendir boð eftir Jenisi.

Tað er greitt at teir tríggir hóvligu í Fólkaflokkinum nú liggja flatir fyri Jenisi. Fráboðan í útvarpinum um at eingin króna skal av blokkinum ljóðar áhugaverd. Í samráðingunum við Javnaðarflokkin kom slíkt ikki uppá tal. Var hetta bara eitt krav frá Tjóðveldisflokkinum tá samráðst var við Javnaðarflokkin, men sum síðan var lagt á hyllina tá Jenis kom inn í myndina.

Ikki so løgið at tann hóvligi parturin av veljarunum hjá Fólkaflokkinum sum ein skilur hevur fingið vissu fyri at eingi samgonga verður við Miðflokkin nú stendur spyrjandi.

Sjálvstýrisflokkin hoyrdist einki aftur til síðan hann lat samráðingarrætt sín til Fólkaflokkin. Tað tykist sum Sjálvstýrisflokkurin hevur stovnað eitt smápartafelag við Fólkflokkin við samráðingarrættinum liggjandi hjá Fólkaflokkinum. Tað má tykjast løgið hjá hesum at hoyra Jenis boða frá at tað eru eingir trupulleikar við yvirtøkuni av fólkakirkjuni.

Spennandi verður at hoyra um løgmaður enn stendur við fráboðanina um at orsøkin til at breiða samgongan ikki sá dagsins ljós, var at Tjóðveldisflokkurin hvørki kundi ella vildi samstarva við Javnaðarflokkin.

# Skal fíggjarlógin skerjast?


**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*




Løgtingsvalið og hin breiða samgongan.

Eftir valið er komið fram, at mælt er til at skerja fíggjarlógina við 200 milliónum krónum – í bestu tíð, føroyingar vita um!

Sambandsflokkurin spurdi áðrenn valið, hvussu skerjingin av ríkisveitingini kom at ávirka fíggjarútlitini í Føroyum. Vit fingu onki svar tá. Tí er undarligt, at slíkt kemur undan kavi, beint eftir valið! Hetta minnir ikki sørt um, at upplýsingar verða fjaldir fyri løgtinginum. Um so er, eigur tað at fáa avleiðingar!

Undir valstríðnum kom fram:

- at samferðslan skal útbyggjast bæði á sjógvi og landi
- at eldraøki má útbyggjast
- at barnaansing og skúlar skulu útbyggjast og mennast
- at pensiónirnar skulu hækkast
- at skattalætti má fremjast.
- at vinnan skal fáa betri karmar at virka undir
- at skynsamur fíggjarpolitikkur skuldi fremjast og uttanlandaskuld minkast
- at útjaðaraøkispolitikkur skuldi fremjast í verki

Til valið 98 fór Tjóðveldisflokkurin fram og fekk 23,8% av atkvøðunum. Tað skuldi eitast, at nú var neyðugt at fara á sjálvstýrisleið av hesi orsøk.

Til valið 2002 fekk Sambandsflokkurin uml 27 % av atkvøðunum. Og loysingarsamgongan misti meirilutan. Eigur veljarin so ikki at síggja eina aðra samgongu, har snara verður meira á ríkisfelagsskapsleið? Eina samgongu, ið rekur ein politikk, ið hugsar um at menna Føroyar. Tí seinastu 4 árini hava vit havt eina samgongu, ið hevur verið samd um at vera ósamd, og hevur ofra føroyingar fyri loysing. Hetta kann ikki halda fram.

### Breiða samgongan

Løgmaður hevur tosað um at skipa eina breiða samgongu. Men hesa hava vit onki sæð til. Eins og vit heldur ikki sóu til nakra breiða samgongu, eftir teir mongu kaffifundirnar. Ei heldur sóu føroyingar nakað til teir miklu skattalættar, ið lovaðir vóru.

Eisini hevur Sjálvstýrisflokkurin sagt, at ein samgonga við Miðflokkinum kom ikki at síggja dagsins ljós, tí tá fór Sjálvstýrisflokkurin úr samgonguni!

### Fíggjarvánir

Tað skert ikki burtur, at fíggjarvánirnar versnaðu nógv, eftir at fullveldissamgongan skerdi ríkisveitingina við uml 400 milliónum krónum. Ein skerjing uppá 1500 milliónir krónur í einum valskeiði. Hetta kundi betri verið nýtt til annað – t.d. at goldið uttanlandaskuld við!

### Miðflokkurin

Um Miðflokkurin fer at skerja av óbeinleiðis veitingini, so versna kor føroyinga uppaftur meira. Og ómøguligt verður at halda givin lyfti undan valinum. Helst verður neyðugt at skerja munandi á fíggjarlógini. Miðflokkurin eigur at ansa sær ikki at verða drigin uppá tráð av núsitandi samgongu, so at meginparturin av samgonguskeiðnum verður nýttur til at »arbeiða við at orða ein eldrapolitikk, skúlapolitikk, heilsupolitikk, fiskivinnupolitikk, familjupolitikk o.s.v« Ímeðan skert verður á loysingarleið. Og mong økir verða aftur forsømd hetta valskeið.

### Sambandsflokkurin

Sambandsflokkurin hevur gjørt eitt gott val. Vit vilja nýta okkara ávirkar til at fremja ein politikk, ið bøtir um kor føroyinga. Tí tað er so nógv, ið kann og eigur at gerast betri. Mangt av hesum er tugt og tanla so nógv, at ikki er neyðugt við øðrum en skilagóðum avgerðum, fyri at fáa viðurskiftini í rættlag. Tað vilja vit arbeiða fyri.

# Kvinnuskeið um sjálvsmenning

TÍÐINDASKRIV

Ert tú konufólk og hevur áhuga fyri at menna teg persónliga, hevur júst hetta skeið kanska tín áhuga. Skeiðið, sum er fyri kvinnur í øllum aldursbólkum, verður hildið í Havn í døgunum 1.-2. juni í ár.

Skeiðleiðari er Anette Sundby. Hon var í Føroyum í heyst og helt eitt væleydnað skeið og hevur tí hug at royna hetta aftur.

»Ein ferð byrjar altíð við fyrsta fótafetinum,« sigur Anette Sundby, sum seinastu fýra árini hevur hildið serstakt skeið fyri kvinnur. Ein orsøk til, at hetta er kvinnuskeið burturav, kemst av, at kvinnur kenna seg tryggari og kunnu betur tosa um síni viðurskifti sínamillum, tá ið tær eru í bólki fyri seg.

Hon er upprunaliga útbúgvin fólkaskúlalærari, men hevur seinastu 12 árini skipað fyri skeiðvirksemi, har hon m.a. lærir kvinnur, hvussu tær kunnu mennast og soleiðis styrkja sjálvsvirðið.

»Nógvar kvinnur koma á hesi skeið, tí at tær hava hug at læra okkurt nýtt, ella tí tær standa á einum vegamóti í lívinum, har teimum tørvar at læra meiri um teirra persónligu eginleikar,« sigur Anette Sundby.

Orsøkin til, at hon hevur ment hesi serligu kvinnuskeið, er, at hon hevur verið fyri stórum mótburði í lívi sínum. Tað hevur gjørt, at hon ofta hevur ivast í sínum kvinnuvirði. Fyri at vinna á ivanum hevur hon stríðst fyri at endurskapa kensluna av síni styrki sum kvinna. Tað eru m.a. hesar royndir, sum Anette Sundby vil bera víðari til sínar medsystrar.

Skeiðið er fyri kvinnur í øllum aldursbólkum. Ert tú áhugað fyri at læra okkurt nýtt, sum kann menna teg í arbeiðs- og persónliga lívinum, er hetta skeiðið kanska ein møguleiki.

Skeiðið er ikki nakar »undurkurur«, men meira ein byrjan til eina prosess, har tú fært hugskot og íblástur m.a. til at skapa broytingar í lívsgrundarlagnum, sum tú kanska droymir um, men ikki veitst, hvussu tú skalt fremja.

Á skeiðnum er møguleiki at gera sær tankar um lívið, at hugsa seg gjølla um og at arbeiða fram ímóti at seta sær nýggj stevnumið.

Skeiðið verður í Stoffalág 82, 1.-2. juni , frá kl. 9 - 17 báðar dagar. Luttakaratalið er avmarkað til í mesta lagi 16 luttakarar. Kostnaðurin er 1850 krónur, íroknað skeiðtilfar og kostarhald.

Áhugaðar kunnu fáa nærri upplýsingar um kvinnuskeiðið við at fara inn á heimasíðuna

www anettesundby.dk

Sí annars lýsing í blaðnum.



# Venjingarskúlin tók fyrsta plássið frá Runavíkar skúla

**Triðja árið á rað hevur Útvarp Føroya skipað fyri spurnarkapping fyri framhaldsskúlar. Tey bæði fyrstu árini fór Runavíkar skúli við sigrnum, meðan í ár streyk Venjingarskúlin av stað við sigrinum. Teir kappaðust ímóti vinnaranum frá í fjør og fyrraárið, Runavíkar skúla**

SPURNARKAPPING


*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Finnur Justinussen*




*Teir tríggir vinnararnir, Jógvan Heinesen, Heðin Guttesen og Steinar Patursson, saman við vertinum Suna Merkisstein og dómaranum Ova Olsen*

Ein jøvn og spennandi spurnarkapping endaði við, at Venjingarskúlin fór avstað við fyrsta plássinum. Spurnarkappingin er sjálvandi tann, ið Útvarp Føroya seinastu árini hevur skipað fyri. Allir framhaldsskúlar í landinum eru við, og fáa teir møguleika at kappast um æruna at verða best vitandi skúli í landinum.

Hetta er triðja árið skipað verður fyri hesi spurnarkapping. Seinastu tvey árini er Runavíkar skúli farin avstað við fyrsta plássinum, og hevði Runavíkar skúli eisini svarað seg til finaluna í hesi vælumtóktu spurnarkapping.

Tað var ikki fyrr enn í síðsta spurningi, at avgerðin veruliga fall. Síðsti spurningurin var nevniliga ein árstalsspurningur, sum gevur trý stig, og var munurin millum skúlarnar bert eitt stig. Hetta merkti so, at um Venjingarskúlin snávaði, og fór meira enn eitt ár við síðuna av, kundi Runavíkar skúli vinna, um teir megnaðu at gita rætta árstalið. Men soleiðis skuldi tað ikki verða. Báðir skúlarnir vistu rætta árstalið, og hetta hevði við sær, at Venjingarskúlin vann 24 – 23 á Runavíkar skúla. Virðislønin vórðu 1500 krónur í part til teir tríggjar luttakararnar, umframt eitt ognarsteyp og blómur.

### Størri áhuga

Niels Nattestad, skúlastjóri á Venjingarskúlanum, fegnast sjálvandi um hetta frálíka úrslitið.

– Vit eru sjálvandi glað fyri hetta, men vit taka tað ikki fyri meira enn tað er, sigur Niels Nattestad.

– Hetta er undirhald, sum er stuttligt, sum nógvum dámar væl at lurta eftir, og vit leggja ikki meira í tað enn tað er. Men tað er sjálvsagt hugaligt at vinna.

Skúlastjórin á Venjingarskúlanum sigur, at skúlin hevur sum so ikki gjørt nakað serligt fyri at fyrireika næmingarnar til spurnarkappingina. Tað einasta hann vil nevna er, at størri áhugi er vístur næmingunum, og kanska er tað tað, ið hevur gjørt munin.

– Tá vit skuldu velja næmingar burturúr, fingu flokslærararnir boð um at spyrja hvørjir næmingar høvdu hug at vera við. Teir, ið teknaðu seg, vóru so við í eini innanhýsis spurnarkapping her á skúlanum. Næmingarnir fingu eini 25 skrivligar spurningar, sum líkjast teimum, sum verða settir í útvarpinum, og so vórðu tríggir teir bestu næmingarnir valdir út, greiðir skúlastjórin frá.

Tríggir teir bestu næmingarnir vístu seg so at vera Jógvan Heinesen úr 9. a, Heðin Guttesen og Steinar Patursson úr 10. b.

### Lisið nógv

Sjálvt um skúlin sjálvur ikki hevur staðið fyri at fyrireika næmingarnar til spurnarkappingina, so hava teir tikið stig til hetta sjálvir.

– Vit hava lisið rættiliga nógv, sigur Jógvan Heinesen, sum saman við Heðin og Steinar gjørdist vinnarin av spurnarkappingini.

– Søgualfrøðin, Aftur og Fram bøkurnar og aðrar bøkur. So hava vit eisini fylgt væl við í tíðindunum. Ikki bara nú, men upp ígjøgnum árini.

Jógvan sigur, at teir eru ógvuliga áhugaðir í almennari vitan, og royna at fylgja við í tí, sum hendir í samfelagnum.

Men hvussu var so at vinna ímóti tí skúlanum, sum seinastu tvey árini hevur togað tað longra stráðið?

– Fyri tað fyrsta var tað sjálvandi ógvuliga gott at vinna, og so at vinna á teimum, sum hava vunnið tvey tey seinastu árini varð bara uppaftur stuttligari, sigur ein fegin Jógvan Heinesen.

Um spurnarkappingin verður aftur á skránni næsta ár vita vit ikki enn, men um so er, so fáa allir framhaldsskúlar í landinum so møguleika til at ogna sær hetta fyrsta plássi.

Sosialurin ynskir Venjingarskúlanum hjartaliga tillukku við sigrinum.



*Í ár var nakað heilt serligt gjørt burturúr finaluni. Skúlstjórar, lærarar, næmingar og avvarðandi vóru við í upptøkuhølunum, tá finalan varð send beinleiðis kring landið*



*Teir tríggir úr Runavíkar skúla, sum í ár ikki megnaðu at koma longur enn á annað plássið, Tórður Djurhuus, Tóri Højgaard og Magni Lamhauge*